## Prísurin á Playstation 3 minkaður

Góð tíðindi eru at bera foreldrum, ið møguliga ætla at keypa børnunum vælumtókta Playstation. Tá ið nýggja útgávan, Playstation 3, kom út, mettu nógv at prísurin var sera høgur. Eftir øllum at døma halda framleiðararnir tað sama, tí nú fyri aðru ferð verður prísurin á teimum niðursettur. Í Danmark kostar ein slík boks nú 3278kr., og tað er ein príslækking á 550kr. Ikki er greitt, um prísirnir fáa ávirkan á prísin í Føroyum.



## Íverksetarahúsið skipað seg

Hóskvøldið helt nevndin, sum varð vald av Klaksvíkar Býráð at stjórna íverksetarahúsinum, sín fyrsta fund. Nevndin skipaði seg við Kitty Mai Ellefsen sum forkvinnu. Hinir limirnir í nevndini eru Eyðun Mørkøre, deildarleiðari hjá Eik, og Torben Hendriksen, stjóri í Birc Estate í Herning. Rani Nolsøe varð settur sum dagligur leiðari av Íverksetarahúsinum. Annars viðgjørdi nevndin á sínum fyrsta fundi reglugerðina fyri 'Grunnin Íverksetarahúsið', sum var tikin til eftirtektar. Nevndin viðgjørdi eisini mál og vísjónir við Íverksetarahúsinum. Virksemið higartil, síðani byrjanina í januar í ár, var eisini á skránni. Somuleiðis varð fíggjarætlan viðgjørd og góðkend.

# Bert ein tekniskur trupulleiki

**Tað hevur ljóðað, at útbúgvingarnar á Fiskivinnuskúlanum ikki góvu atgongd til víðari lestur, men soleiðis er ikki í praksis**

ÚTBÚGVING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Vit arbeiða í løtuni við einari nýggjari gymnasialari skipan, sum umfatar allar miðnámsútbúgvingar í landinum.

Tað sigur Jógvan á Lakjuni, mentamálaráðharri.

Tað hevur ljóðað, at trupulleikar hava verið við at sloppi inn á hægri útbúgvingar hjá teimum, sum hava gingið á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna. Men hetta er ikki heilt rætt, sigur Eyðbjørn Poulsen frá Mentamálaráðnum.

- Vit hava avtalur við danska undirvísingarmálaráðið. Trupulleikin er tekniskur, tí upptøkukunngerðin liggur hjá Ministeriet for Videnskab og ikki hjá undirvísingarmálaráðnum. Og í kunngerðini standa nakrar føroyskar útbúgvingar positivt nevndar, student, HF og HT. Tí mugu vit viðhvørt aktivt inn í málið, tá aðrar útbúgvingar skulu søkja inn á danskar skúlar, sigur Eyðbjørn Poulsen.

Hetta er tó bert í heilt fáum førum, og í nøkrum serligum skúlum, sum ikki eru kunnaðir um avtaluna, sum Mentamálaráðið hevur við donsku skúlamyndugleikarnar.

- Tað kemur fyri, at vit mugu senda eitt bræv til onkran serliga skúla og vísa á avtaluna, sum vit hava við danir, sigur Eyðbjørn Poulsen.

Hann sigur víðari, at teir hava fingið lovað, at hesi viðurskiftini skulu koma upp á pláss »í leypi av komandi árinum«. Annars er tað Mentamálaráðið, sum góðkennir útbúgvingarnar, og ikki danskir myndugleikar. Eyðbjørn Poulsen sigur, at føroysku útbúgvingarnar eru fult á hædd við tær donsku, men trupulleikin liggur sum nevnt í, at upptøkukunngerðin liggur hjá Ministeriet for Videnskab og ikki hjá Uddannelsesstyrelsen.

Men hetta verður sum sagt komið upp á pláss innan árið er runnið.




*Útbúgvingarnar á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna eru fult góðkendar hjá donskum myndugleikum, trupulleikin er bara, at upptøkukunngerðin liggur hjá skeivum ráði*

# Pengar væl givnir

**Mentamálaráðharrin, Jógvan á Lakjuni, er júst afturkomin av oyggjaleikunum á Rhodos, og hann heldur, tað var eitt upplivilsi fyri lívið**

OYGGJALEIKIR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Nú oyggjaleikirnir eru av, munnu flestu føroyingar líta aftur á dagarnar við stoltleika. Alment hava vit neyvan heldur verið betri umboðað enn hesaferð, tí bæði løgmaður og mentamálaráðharrin vóru til staðar á leikunum á Rhodos.

Jógvan á Lakjuni sigur, at hetta er fyrstu ferð, at hann er á einum oyggjaleikum. Og tað var ein uppliving fyri lívið, heldur hann.

- Eg havi sjálvandi upplivað oyggjaleikir áður, men tað hevur verið gjøgnum fjølmiðlarnar, og tað er nú ikki heilt tað sama. Hetta hevur avgjørt verið eitt fantastiskt upplivilsi, ikki minst tí tað gekk okkara ítróttafólki so væl, sigur Jógvan á Lakjuni.

Hann sigur víðari, at leikirnir hesaferð vóru langt burturi, og tað er sum kunnugt dýrt at ferðast. Ivi var eisini fyrr í vár um, hvørt allar ítróttagreinirnar høvdu ráð at fara ti leikirnar, og tað var tí, at Mentamálaráðið játtaði ein eykastuðul til ÍSF, so øll sluppu avstað.

- Og tað vóru pengar, sum vóru væl givnir, sigur Jógvan á Lakjuni, nú hálið gjørdist so óført av heiðursmerkjum.



*Jógvan á Lakjuni, mentamálaráðharri, var við til einar oyggjaleikir fyri fyrstu ferð á Rhodos*